## Ráðharrar í leigu-flogfari

Tað hevur elvt til eitt sindur av orðaskifti í íslendskum fjølmiðlum, at Geir H. Haarde, forsætisráðharri, og Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, uttanríkisráðharri, fóru á NATO-fund í Rumenia við leigaðum flogfari. Men stjórnarskrivstovan sigur, at skuldu tey bæði farið við rutuflogfari, máttu tey gist eina nátt í London á vegnum, og at tí er lítil munur á prísinum. Umframt ráðharrarnar vóru 10 embætisfólk og fýra blaðfólk í tí leigaða flogfarinum.



*Leiguflogfarið var eitt Dornier 328-flogfar hjá íslendska felagnum Icejet*

*Mynd: Vísir*

## Vinnuframi er loysnin

Í hesum døgum eru vinnustjórarnir í teimum grønlendsku kommununum á skeiði, har teir fyrireika seg til tær broyttu umstøðurnar, nú kommunurnar verða lagdar saman. Sara Heilmann hjá Grønlands Turist- og Erhvervsråd, sum stendur fyri skeiðinum, sigur við KNR, at tær nýggju kommunurnar skulu hugsa øðrísi enn tær gomlu, tí í framtíðini verða vinnuframi og vinnufremjandi tiltøk loysunarorðini hjá teirri einstøku kommununi.

# M/S Staaløy skaraði framúr í sniði og skapi

**Gekk mær ein kaitúr herfyri. Knappliga rakti eg við navnið Staaløy, norskur svartkjaftaátur, ið lá við bryggju. Tá runnu tankarnir aftur til fimmti árini, tá ið javnan norskir sildabátar komu inn á Fuglafjørð í sildatíðini. Ein teirra æt Staaløy, og vit smádreingir vóru hugtiknir av hesum báti, tí hann var so sera snøggur, hugleiðir Frits Johannesen í Fuglafirði**



*Norski svartkjaftabáturin Staaløy á Fuglafirði*



*Knut Helge Drønen er skipari á Staaløyw*

**HUGLEIÐING**
*Frits Johannesen*

Hetta var ein stálbátur við hvítari stálbrúgv. Hann skaraði framúr í sniði og skapi í mun til aðrar bátar um tað mundið. Henda dag, sum her verður hugsað um, lógu fleiri aðrir norskir sildabátar við bryggju m. a. Manon, Gardar og Risholmen. Hetta vóru træbátar. Ikki at tala um tær føroysku dangurnar, sum næstan vóru komnar at gravarbakka við sínum tunga hjalli, stóðu ikki í mát við hetta far. Hóast henda tunga burð, hóraðu tær næstan allar undan í sildatíðini í fimmti árunum, men máttu lúta fyri nýggju tíðini í seksti og sjeyti árunum.



*Navnið »Staaløy« er eitt kent skipanavn í Fuglafirði*

### "Andenæs"

Tað var ikki nakað nýtt sum so, at norskir fiskimenn komu inn á Fuglafjørð at dansa. Hetta var ein siðvenja, sum stakk seg upp, tá ið norsk fiskifør millum krígsárini vóru á veg til Grønlands. Tá leitaðu tey inn á Fuglafjørð at vera her eina ella tvær nætur og dansa. Norsku sjómenninir høvdu sjálvir harmoniku við, og soleiðis trinu teir dansin í Fuglafirði, áðrenn siglt varð til Grønlands. Eitt annað, sum var forvitnisligt, var, at fuglfirðingar tóku hesi norsku løg til sín, tí harmonikan átti gott rásarúm í bygdini. Í fimmti árunum upplivdu vit tað sama. Tá var "gaman at leva". Einki var, sum tá ið korvettin Andenes (norskt marinuskip) lá her og reinsaði ketil. Hon var her í 1954 og 1955. Tá varð dansað í 14 dagar hvørt kvøld og sjálvir høvdu norðmenninir dansiorkestur. Staaløy hevði eitt akker við úr Norra, sum Andenæs skuldi hava. Alt var á gosi. Marinarnir vóru so kimligir og fimir, at gentur aðrastaðni frá leitaðu higar í dans. Summar var og lýtt, so hví ikki tað? Alt ber til, tá ið ein er ungur. Dansur var næstan hvørt kvøld í einar 14 dagar. Genturnar seymaðu sær skrúð og skreytir, so teir norsku sveinarnir skuldu ikki hava tað at siga, tá ið knarkarnir aftur fóru suður ígjøgnum Leirvíksfjørð ella norður ígjøgnum Djúpini, at sprundini í Fuglafirði vóru nøkur kloddafyl. Nei, snøggar vóru tær, tá ið tær fóru eftir vegnum í nýseymaðum kjólum við einum litfagrum turriklæði í hondini, høghælaðum dansiskóm, putraðar, varrarnar lýstu sum reyð sigluljós, og hárið dúkaði í summarkyldini. Tað stóð við klettin, og eitt tám fór um Gjógvarahamar, .. og norsku sveinarnir vóru hugtiknir av hesum elskuligu oyggjafljóðum. Ein sangur varð gjørdur um hesa vitjan, sum byrjaði við: Nú Andenes er farin.

### Fótbóltur

Teir vóru ikki einans góðir dansarar, men dugdu eisini at sparka bólt, og varð fótbóltsdystur skipaður millum ÍF og marinarnar fleiri kvøld á kaiini, sum tá var fótbóltsvøllurin í bygdini. Tá ið bólturin fór á sjógvin, lupu hesir ungu marinarar á bláman eftir bóltinum. Tá vóru glómur í okkum smádreingjum, og genturnar stóðu í minni hópum og hugdu at við smædnum eygum at onkrum, sum tær høvdu dansað við kvøldið fyri, kanska var tað hann, sum leyp á bláman. Dugdi hann væl at svimja, so dugdi hann so stak væl at dansa rheinländara. Kærleiksrúsurin bara vaks. Onkur mamma sat heima við hús og kvíddi fyri, hvussu leikur fór at hasa av,... men kansaka var hon ein av teimum, sum dansaði millum krígsárini við onkrum reyðhærdum norðmanni, sum hon ongantíð gloymdi, men hevði hann í einum loynikróki í sínum poetiska heimi? Hví skuldi dóttirin ikki eisini hava eina slíka uppliving? Kanska hevði dóttirin kjósað sær ein,....., ja, ja, nú var alt vorðið til minnir hjá hini gomlu,..... og hvussu er tað vorðið hjá teimum damum í bygdini í dag, sum í dag stunda til sjeyti? Tær sita eisini og goyma at einum fittum marinara ella onkrum norskum dreingi, sum kanska var við Staaløy ella Andenes? Hetta er teirra loynidómur,.... og kanska var sjeikurin eisini reyðhærdur.

Tað er sama reiðarií, ið eigur hendan Staaløy, sum átti tann, sum vit sóu við bryggju í fimmti árunum. Hetta er fimti bátur við hesum navni. Reiðaríið varð stovnað 1942. Tað vóru brøðurnir Kristoffer Drønen og Rasmus Drønen frá Toransvåg (Austevoll), sum løgdu grundarsteinin undir hetta reiðaríið. Staaloy, sum her verður hugsað um, var seldur 1972 og søktur í Bjørnefjorden 1979.

Skipari á hesum bátinum er Knut Helge Drønen, Torangsvåg. Hann er sonur Kristoffer Drønen. Báturin er bygdur í 2000, har Simek A/S hevði høvuðsábyrgdina av byggingini. Skipið er 68,3 m langt, 14 m breitt og lastar 1800 m,$^3$ og motorurin hevur 7500 hestakreftir.

Hetta var bara eitt lítið nos, sum stakk seg upp í hugan næstsíðsta leygarkvøld, tá ið tú gekst tær ein kaitúr.